Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir

Spurningar:

1. Hvussu leingi er tað síðani, at fyrstu umsóknirnar um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir komu inn til Fiskimálaráðið (tær, ið við prosenttølum eru ásettar í lógini um sjófeingi)?

2. Hvussu nógvar umsóknir eru komnar tilsamans síðani lógin varð samtykt í desember 2019?

3. Hevur Fiskimálaráðið viðgjørt umsóknirnar og gjørt fyrisitingarligar/fakligar niðurstøður um, hvørjar umsóknir eiga at játtast – og um so er, hvussu ofta er tað gjørt og fer landsstýrismaðurin at fylgja fyrisitingarligu/fakligu tilmælunum?

4. Hví eru hesar kvotur, ásettar í lógini, ikki avgreiddar og hvussu kunnu tær gagnnýtast í ár, nú vit eru komin út í september mánað?

5. Hevur landsstýrismaðurin viðgjørt hesar umsóknir og játtanir til ítøkiligar kvotur munnliga við løgmann og onnur landsstýrisfólk ella við samgongutingfólk?

Viðmerkingar:
Enn er onki frætt um tær kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, sum eru ásettar í fleiri greinum í lógini um sjófeingi við ávísum prosenttølum av kvotunum av uppsjóvarfiski.

Vit skriva nú september 2021, og lógin varð samtykt í desember 2019. Lýst hevur verið eftir umsóknum fleiri ferðir, og helst eru fleiri, sum bíða eftir svari.

Tí verður spurt um, hvat fer fram fyrisitingarliga og møguliga politiskt í hesum máli, har stór virði liggja í leysum lofti.

Á Løgtingi, 7. september 2021

Høgni Hoydal